FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF FAROE ISLANDS

FYLGISKJAL 5

Hoyringssvar viðvíkjandi broyting í lógini um miðlastuðul

Størsti veikleikin við verandi lóg er, at tað er ógjørligt at meta um, hvussu miðlastuðulin ávirkar framleiðsluna og innihaldið hjá teimum miðlum, sum fáa stuðulin. Lógarbroytingin, har stuðulin fer frá at vera eitt slag av rakstrarstuðli til at vera grundaður á verkætlanir, fer at hava við sær, at bøtt verður munandi um henda trupulleikan. Skipanin fer at líkjast meira skipanini viðvíkjandi granskingarstuðli, har lítil ivi er um, hvat pengar verða játtaðir til, og har viðkomandi, sum fær stuðulin eisini stendur til svars fyri framleiðsluna, sum stuðulin er ætlaður at birta upp undir. Hetta er ein skilagóð broyting, sum Fróðskaparsetrið tekur undir við.

Broytingin setur størri krøv til viðgerðina av umsóknum enn áður, og inniber eisini ein ávísan váða, um stuðul verður útgoldin áðrenn arbeiðið verður framt. Vansin við at gjalda pengar út aftaná miðlaframleiðsluna er, at miðilin verður noyddur at leggja út fyri møguligar útreiðslur av verkætlanini, sum kann minka um hugin at søkja. Ein loysn má finnast á hesum, eitt nú at stuðul verður útgoldin í tveimum ella fleiri stigum.

Lagt verður til merkis, at hildið verður fast í treytini um, at ein umsøkjari skal kunna vísa á lønarútreiðslur svarandi til minst tvey ársverk í undanfarna ári. Hetta fer at avmarka munandi, hvør hevur møguleika at søkja stuðulin. Fyrimunurin við treytini er, at tryggja verður frá byrjan, at allar umsóknir eru kjølfestar í eini redaktión, sum kann hava við sær, at umsóknirnar vera færri, at miðalgóðskan á umsóknum verður hægri, og at umsitingin verður minni.

Hinvegin kann tað eisini sigast at vera ein vansi við treytini, at tað verða færri umsóknir og at tað sostatt verður verri hjá einstøkum journalistum ella smærri miðlum at sleppa fram at stuðlinum. Ein kundi eisini spurt, um tað gevur meining at hava ein miðlastuðul, sum hevur til endamáls at betra um miðlalandslagið í Føroyum, fyri síðani at gera tað torført hjá nógvum at søkja stuðulin.

Ein kann spyrja, hvussu týdningarmikil treytin um tvey ársverk er, og hvussu vandamikið tað hevði verið at sloppið sær av við treytina. Um miðlastuðulsnevndin kortini skal viðgera umsóknir sambært journalistiskari dygd og samfelagsligum virði, so fara tær umsóknir sum hava eina redaktión aftanfyri seg, kortini at vinna á teimum, sum hava minni fakligan førleika at vísa á. Tí ber til at grundgeva, at ein hevur einki at missa við at taka treytina burtur. Hetta er tó ein politiskur spurningur, tí tað snýr seg um, hvussu høg gáttin skal vera inn til stuðulin, og hvussu nógv umsiting skal vera av stuðlinum. Er gáttin høg, eru færri umsóknir og minni umsiting. Er gáttin lág eru fleiri umsóknir og møguliga meira fjøltáttað tilfar, men meiri umsiting.

Her skal kortini leggjast afturat, at hetta hevur ongantíð verið roynt í Føroyum, og at tað tí er torført at spáa um, hvussu nógvar umsóknir koma inn. Kortini hevur tað týdning at geva sær far um, at tað ikki má verða ov torført at søkja miðlastuðulin, tí annars verður endamálið um eitt fjøltáttað miðlalandslag torførari at røkka.

Hetta er samstundis eitt kjak um, hvørt ætlanin við miðlastuðlinum fyrst og fremst er at lívbjarga fyritøkum, sum í dag framleiða aktualitetstilfar, ella um ætlanin fyrst og fremst er at fáa dygdargott tilfar til borgararnar. Er málið tað fyrra, er skilagott at avmarkað umsóknirnar, men er málið tað seinna, má atgongdin til miðlastuðulin vera lættari, tí so sleppa nýggir aktørar eisini lættari fram at. Harafturat stendur í viðmerkingunum undir 1.4 at "farið verður frá, at miðlarnir søkja stuðul við útgangsstøði í lønarútreiðslunum, til at søkt verður við útgangsstøði í ítøkiligari verkætlan." Hetta er ikki ordiliga rætt, um hildið verður fast í treytini um tvey ársverk. Eitt nú kann ein støða lættliga stinga seg upp, har ítøkiliga

verkætlanin vísir á hollar førleikar og gott hugskot, men at umsóknin ikki sleppur til viðgerðar, tí hon ikki uppfyllir treytina um tvey ársverk.